Prix Føroyar er ein tónleikakapping, sum Norðurlandahúsið í Føroyum skipar fyri í samstarvi við Føroya Undirhaldstónleikarafelag (FUT), Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya. Kappingin hevur verið hildin annað hvørt ár síðani 1995.

Kappingin er skipað við fimm innleiðandi umførunum, har vinnarin í hvørjum umfari kemur í finaluna. Bólkarnir, sum enda sum nummar 2 til innleiðandi umførini, skulu kappast í eini hálvfinalu, har vinnarin fær seinasta finaluplássi.

Øll tey innleiðandi umførini verða hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Finalan verður í Norðurlandahúsinum í Havn.

29 bólkar eru við í kappingini í ár. 6 bólkar sleppa í finaluna.

**1. umfar, 25. januar kl. 21.00**
Flux
S.C.A.T.G.O.H
Headache Blues Treo
Søren Søgaard
MC Hár
Human Chaos
Vinnari: MC Hár
Nummar 2: Headache Blues Tro

**2. umfar, 1. februar kl. 21.00**
Mind's Eye
Déjá Vu
onkikanndiskuterast.alt kann
Speaker
Holgar og Villmenn
Vinnari: Déjá Vu
Nummar 2: Mind's Eye

**3. umfar, 15. februar kl. 21.00**
Braquet
Crashwave
Mary's Baby
Lawetz
Krit
Masha
Vinnari: Braquet
Nummar 2: Lawetz

**4. umfar, 22. februar kl 21.00**
Makrel
Chain
Side Effect
Fluffy Toys
MMM
Páll Finnur Páll
Vinnari: Makrel
Nummar 2: Fluffy Toys

**5. umfar, 8. mars kl. 21.00**
Týr
Zink
Blív
Jam
Gestir
Hatespeech

# Nógv kend nøvn at spæla saman við

**Prix-bólkarnir, sum sleppa til útlendsku festivalarnar at spæla, kunnu gleða seg til at spæla saman við nógvum kendum donskum og útlendskum nøvnum. Serliga í Skanderborg eru nógv kend nøvn á skránni**

FESTIVALAR
*Eyðun Klakstein*



*Braquet er ein av finalubólkunum, sum hevur møguleikan at gera vart við seg, tá ið umboð fyri útlendskar festivalar fara at velja sær ein bólk*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tríggir av størru donsku summarfestivalunum fara at hava føroyskan bólk við í ár.

Tónleikafestivalarnir í Skanderborg, Nibe og Jelling koma í apríl mánaði til Føroya, og teir fara at velja sær ein bólk millum teir, sum eru við í Prix Føroyar finaluni. Hesir bólkar kunnu gleða seg til eina spennandi avbjóðing, har teir koma á plakatina saman við nógvum kendum tónleikanøvnum.

Í fjør vóru Nibe og Jelling eisini til Prix-finaluna, og hesaferð er Skanderborg komið afturat. Í Skanderborg verður kappingin Star Fighters, sum er fyri nýggjar bólkar, og her skal vinnarin av Prix Føroyum verða við.

## Skanderborg

Skanderborg Festivalurin hevur nógv og fjølbroytt nøvn á skránni teir fýra dagarnar, festivalurin er fyrst í august mánaði.

Enn er ikki endaliga greitt, hvussu skráin verður í ár, men nógv nøvn eru longu kunngjørd. Tiltikni sangarin Led Zeppelin, Robert Plant, kemur til jútska býin saman við sínum bólki. Nógv umrøddu norðmenninir í Kaizers Orchestra verða við, og tað verður eisini familjubólkurin Kelly Family.

Millum mongu donsku nøvnini á festivalinum ber til at nevna TV2, DAD, Kashmir, Sort Sol og Christian.

## Jelling og Nibe

Jelling festivalurin verður hildin longu síðst í mai mánaði, og har hava fyriskipararnir boðað frá, at Status Quo verður høvuðsnavn.

Onnur nøvn, sum leggja leiðina fram við í Jelling, eru Gnags, Lars Lilholt, Kim Larsen, Big Fat Snake, Nik & Jay og Hanne Boel.

Festivalurin í Nibe fer fram fýra dagar síðst í juni, og har verður Runrig millum bólkarnar, sum fara at spæla. Runrig var í fjør í Føroyum og spældi á Listastevnuni.

Nýggja heita navnið í donskum rocktónleiki, Carpark North, fer somuleiðis at spæla í Nibe.

## Ikki bara vinnarin

Vinnarin av Prix Føroyum hevur tryggjað sær luttøku í Star Fighters kappingini, sum fer fram í Skanderborg, men hinir báðir festivalarnir fara sjálvir at velja, hvørjar bólkar, teir vilja hava at spæla hjá sær.

Í 2001 fekk Clickhaze annað festivalplássið, meðan Týr, sum ikki var millum tríggjar teir fremstu bólkarnar í finaluni, fekk hitt festivalplássið.

Soleiðis kann tað ganga aftur í ár, og tí leggja bólkarnir nógv í, at teir eru við í finaluni, tá ið øll tey heimligu og útlendsku eyguni eru vend ímóti pallinum í Norðurlandahúsinum.

## PRIX - og tala ikki

# Spæl ein góðan



*Eyðun Klakstein*

Prix Føroyar tónleikakappingin setir rættiliga fer á virksemið hjá spírandi komponistum. Har er nevniliga einki at gera. Skalt tú við í Prixið, skalt tú spæla nýggjar sangir. Og so velja flest allir bólkar at taka sakina í egna hendur og skriva sangir.

Hetta er gott fyri føroyskt tónleikalív. Tað gevur nógvum tónleikabólkum eitt spark í afturpartin, so teir taka seg saman og royna seg sum tónasmiðir og yrkjarar. Sjálvandi er misjavnt, hvussu tað eydnaðist, tá ið sangir skulu skrivast, men síðani 1995 eru nógv hitt komin fram gjøgnum Prixið. Líka frá teimum fyrstu døgunum við Moirae og Hjarnum, síðani við bólkum sum Mark No Limits, Aria og Kjølum, síðani Tangz, Flux og Taxi, og seinast við Clickhaze, All That Rain og Týr.

Her eru sangir, sum føroyskt tónleikalív hevur havt stóra gleði av, og tað er bara at fegnast um, at Prix Føroyar hevur verið orsøkin til, at meira heimagjørt tilfar er at finna í føroyskum tónleiki.

Tónleikabólkarnir eru eisini farnir at leita meira eftir sínum egna ljóði, og teir royna at ganga nýggjar leiðir. Hetta er nakað, sum útlendsk plátufelagsfólk halda vera avgerandi, um bólkar skulu vinna fram uttan fyri landoddarnar. Tað nyttar ikki at vera eitt føroyskt kopi, tá ið fólk hava ein útlendskan original. Clikchaze hevur megnað at funnið sítt egna ljóð, og tað hevur Týr eisini. Hesir bólkar vóru í fjør teir mest virknu føroysku bólkarnir uttanlands, og tað komst millum annað av, at bólkarnar hava nakað serstakt at bjóða.

Her heima er tað eisini vorið vanligt, at bólkar spæla sínar egnu sangir, tá ið teir eru við á konsertum kring landið. Coverløgini verða skúgvað til viks, tí bólkarnir vilja spæla sítt egna tilfar, og áhoyrararnir eru vorðnir alt meira opnir fyri tí nýggja tilfarinum.

Her er kanska hóskandi at siga men. Tí tað er eitt men. Nógvir av bólkunum, sum eru frammi í dag, hava als ikki somu tónleikaligu barlastina, sum bólkar plagdu at hava. Makrel kom næstan í neyð, tá ið teir skulu upp á pallin fyri at geva nøkur eykanummur, tá ið teir høvdu vunnið fjórða undanumfarið í Prixnum. Teir lovaðu at hava fleiri sangir at taka av næstu ferð. Sama var skilið, tá ið Déjá Vu kom aftur á pallin sum vinnari av annað umfari. Teir royndu seg við onkrum coverlagið, men tað endaði galið, og teir góvust bara at spæla.

Orsøkin til hetta er helst, at tað er ikki longur politiskt korrekt at spæla covertónleik. Nógvir bólkar hava ein hálvan tíma við egnum tilfari, sum teir spæla á konsertum, og that's it. Teir eru ikki førir fyri at spæla coversangir í ein tíma og enn minni at spæla til dans í tríggjar tímar. At spæla covertónleik er ikki vegurin fram hjá føroyskum tónleiki, men tað gevur royndir, barlast, lærdóm og vitan, sum kann vera gull verd, tá ið gylti vegurin til útlandið skal finnast.

Í áhugaverdu sendingunum Tónasláttur var herfyri greitt frá um bólkin Funkies, sum var virkin fyri meira enn 20 árum síðani. Teir spældu ofta til dans tríggjar ferðir um vikuna, og onkuntíð tvær ferðir í eitt kvøld. Tað ger so at siga eingin føroyskur bólkur longur, og harvið er ein ella annar tónleikaligur missur. Tónleikararnir í Funkies endaðu ikki bara sum covertónleikarar, tí eitt nú var Terji Rasmussen við í bólkinum, og hann skrivaði seinni eitt hitt fyri og annað eftir.

Tað er sanniliga at fegnast um, at føroyskir bólkar nú á døgum leita eftir sínum egna stíli, sínum egna ljóði, við sínum egnu sangum. Tað er har stóra avbjóðingin liggur. Men tað er stórt spell, at bólkarnir hava einki annað hava at taka av, tá ið tað stendur á. Teir spæla eingi coverløg, halda kanska lítið um tað, og teir spæla aldri til dans við sveittabroti eina heila nátt.

Um tú nú skuldi verið í káta lagnum til eitt av Prixkvøldunum í Fuglafirði, so kundi tú kanska roynt at rópt »spæl ein góðan«, tá ið vinnarabólkurin var komin aftur á pallin. Men tú hevði helst fingið nøkur uppgevandi og ivandi eygu sendandi afturímóti av pallinum.





*Pauli Gaard Olsen og Hans Marius Ziska Weihe eru tríggir av tónleikarunum í rockbólkinum Hatespeech*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hatespeech kokkast til Prixið

**Kokkurin Jákup Pauli Gaard Olsen og hansara menn í Hatespeech bjóða kompromileysan rocktónleik í seinasta undanumfarinum í Prixnum, har kappingin verður sera hørð**

HATESPEECH
*Eyðun Klakstein*

Tað verða settar stórar vónir til rockbólkin Hatespeech, sum er við í seinasta undanumfarinum í Prixnum leygarkvøldið.

Slaturin í føroyska tónleikaumhvørvinum vil vera við, at bólkurin er sera væl fyri, og at teir eru favorittar til at vinna kappingina.

Men teir fáa harða kapping leygarkvøldið.

– Eg rokni við, at vit hava eins góðan kjans sum allir hinir bólkarnir. Hvørki meira ella minni, sigur Jákup Pauli Gaard Olsen, sum er sangari í bólkinum. Hann er eisini útbúgvin kokkur og starvast á matstovuni Merlon í høvuðsstaðnum.

– Vit hava gott tilfar í løtuni. Sangirnir eru góðir, og tónleikurin er sera fjølbroyttur. Vit spæla kompromileysan heavy-tónleik. Vit fáa íblástur frá sera ymiskum bólkum og tónleikastílum, og tað hoyrist kanska aftur í tónleikinum, sigur hann.

## Bólkur lá stillur í fimm ár

Hatespeech gjørdi rættiliga vart við seg í fyrst í nítiárunum, men tá ið tónleikararnir í bólkinum fóru undir lestur í Danmark í 1997, steðgaði bólkurin upp.

– Vit vóru so at siga allir í Keypmannahavn og høvdu møguleikan at venja og spæla, men har hendi einki, sigur Jákup Pauli Gaard Olsen.

Hatespeech lá stilt í fimm ár, til teir í fjør vóru við á eini jubileumskonsert hjá plátufelagnum Tutl. Síðani hevur bólkurin verið meira úti um seg, og seinastu vikurnar hava teir spælt á trimum ymiskum konsertum kring landið.

Leygarkvøldið snýr tað seg so um Prix Føroyar tónleikakappingina, har bólkurin áður hevur tikið lut. Hatespeech var fyrsti bólkurin, sum spældi harðan rocktónleik, sum kom í finaluna í Prixnum. Tað var í 1997. Nú er nógvur harður rocktónleikur at finna í kappingini, men Hatespeech ætlar at skilja seg burturúr.

## Óvæntaðir vinnarar

Tónleikararnir í Hatespeech halda nógv av Prix Føroyar tónleikakappingini, men teir siga, at teir eru tiknir eitt sindur á bóli av úrslitunum í innleiðandi umførunum.

– Tað hevði verið gott, um dómararnir kundu komið við eini grundgeving fyri, hví teir eru komnir til úrslitið. Eg eri í hvussu er ovfarin av úrslitinum í onkrum av umførunum, sigur Jákup Pauli Gaard Olsen.

Tí fæst hann ikki at siga, at roknar við at koma víðari í kappingini leygarkvøldið, hóast hann heldur, at bólkurin er so væl fyri, sum sjáldan áður.

Hatespeech hevur fingið ein av tónleikarunum í bólkinum flux uppí. Tað er sangarin Hans Marius Ziska Weihe, sum í Hatespeech spælir gittar og syngur kór.

– Tá vit byrjaðu aftur at spæla, vildi eg ikki bæði syngja og spæla gittar. Heðin spældi síðani gittar einsamallur eitt skifti, men vit hildu, at har manglaði okkurt, og so fingu vit lokka Hans Marius uppí. Hetta ger eisini, at vit hava møguleika fyri at brúka kór eisini, sigur Jákup Pauli.

Hann og hinir í Hatespeech hava kokkast óført seinatu vikurnar, og leygarkvøldið skal nýggi rætturin setast á borðið í Fuglafirði.

Vælgagnist!

## 30 ár á muni

Bólkurin Jam, sum er við í Prixnum leygarkvøldið, er nýggjur bólkur, sum ikki hevur verið frammi áður. Fleiri av tónleikarunum í bólkinum hava spælt tónleik í nógv ár, men hendan samansetingin er nýggj.

Bólkurin er serligur á tann hátt, at tað eru 30 ár á muni millum tann elsta og tann yngsta tónleikaran. Trummuspælarin Búgvi J. Magnussen er bara 14 ára gamal, meðan gittarspælarin Gunnar Olsen er 44 ár.

Seks tónleikarar eru í bólkinum, og Ársins Songrødd 2002, Ása K. Dam, er sangari.

**Hálvfinala, 15. mars kl. 21.00**
Allir bólkarnir, sum endaðu sum nummar 2 í teimum fimm innleiðandi umførunum, kappast um eitt pláss í finaluni

**Finala, 26. apríl**
Tann stóra finalan í Norðurlandahúsinum. Seks finalistar kappast um sigurin í kappingini og møguleikan at spæla á donskum festivalum.

**Dómarar**
10 dómarar meta um framførslurnar hjá bólkunum til tey innleiðandi umførini. Teir geva bólkunum stig fyri teir ymsu partarnar av framførsluni. Stigini hjá øllum dómarunum verða tald saman, og síðani verður vinnarin funnin. Í finaluni eru 28 dómarar.

**Vinnarar**
1995: Moirae
1997: Mark No Limits
1999: Taxi
2001: Clickhaze

**Atgongumerki**
Atgongumerki til innleiðandi umførini kunnu keypast á Kunningarstovunum kring landið, í Mylnuni í Miðvági og á Shell-støðini í Gøtudali. Eisini ber til at keypa atgongumerki á www.billetmaskinen.dk
600 fólk sleppa inn til hvørt umfar.

**Bussar**
Í sambandi við kappingina leygarkvøldið koyra bussar til og frá tiltakinum.
Bussar fara úr Vestmanna, Sørvági og úr Havn kl. 20.00
Bussar fara av Toftum og Strondum kl. 20.30. Teir steðga ávíkavist í Leirvík og í Gøtu kl. 20.50.
Aftan á tiltakið koyra bussarnar heim aftur.

**Ferja**
Sjóvegis samband verður til Klaksvíkar kl. 03.45 av Fuglafirði. Ferðaseðlar skulu keypast í Norðoya Kunningarstovu og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

**Prix í Sosialinum**
Lagt til rættis:
Eyðun Klakstein
Teldupostur:
eydun@sosialurin.fo